umhvørvisstovan

P/F Holva Fish
Bryggjan 13
900 Vágur

Argir hin 9. desember 2013
Málsnr.: 13/00302-11
Málsviðgeri: Lena Ziskason

# Umhvørvisgóðkenning

# av

# fiskavirkinum hjá P/F Holva Fish

# í Vági



**Virki:** **Holva Fish**

**Adressa:** **Bryggjan 13, 900 Vágur**

**Matr. nr.:** **168 f**

# 1. Endamál

Endamálið við umhvørvisgóðkenningini er at fyribyrgja og avmarka dálking av náttúru og umhvørvi og ampar, sum kunnu standast av virkseminum.

# 2. Góðkenning og heimild

Henda umhvørvisgóðkenning av fiskavirkinum hjá P/F Holva Fish, er givin við heimild í § 29 í løgtingslóg nr. 134 frá 29. oktober 1988, um umhvørvisvernd, við seinni broytingum, og § 1, nr. 4 í kunngerð nr. 54 frá 3. mai 1994 um at leggja eftirlits- og umsitingaruppgávur eftir umhvørvisverndarlógini til Umhvørvisstovuna, við seinni broytingum.

Góðkenningin er givin til Holva Fish í Vági, sum skal lúka tær treytir, sum eru nevndar parti 6. Góðkenningartreytir. Í sambandi við nevndu treytir, eru nevnd ymisk tiltøk, sum skulu útinnast av Holva Fish, fyri at tryggja, at umhvørvið verður ávirkað so lítið sum gjørligt av virkseminum.

Umhvørvisstovan hevur eftirlit við virkinum. Eftirlitið verður útint sambært kap. 7 í umhvørvisverndarlógini.

Umhvørvisgóðkenning hevur áður verið fyri virksemið, ið hevur verið í sama bygningi. Tað virksemið er hildi uppat og umhvørvisgóðkenning, US mál nr. US-41205-027/08-9, dagfest 20. jan. 2009 er tí ikki galdandi longur.

Henda góðkenning tekur ikki støðu til, um tað er neyðugt við góðkenning eftir aðrari lóggávu.

# 3. Umsókn og viðgerð

Umhvørvisstovan fekk hin 9. september 2013 umsókn frá Holva Fish, um umhvørvisgóðkenning av virkseminum í Vági.

Umsóknin og móttikna tilfarið hava verið grundarlag undir viðgerðini av umsókníni. Eisini hevur Umhvørvisstovan havt fund við umboð frá Holva Fish og hevur verið og vitjað á virkinum.

Undir viðgerðini av umsóknini og í sambandð við at áseta treytir, er m.a. hetta tilfar nýtt:

- Kunngerð nr. 147 frá 19. okt. 1995 um burturkast, við seinni broytingum
- Umhvørvisgóðkenning av Sp/F Frystimiðstøðini, mál nr. US-41205-027/08-9

## 3.1. Málsviðgerð

Undir viðgerðini er serligur dentur lagdur á,

- at fyribyrgja og avmarka dálking av luft, havi og jørð,
- at umhvørvisdálkandi evni ikki verða leidd út í umhvørvið,
- at luktur og óljóð verður avmarkað mest møguligt,
- at innaneftirlit, umhvørvisstýriskipan og skrásetingar samsvara viðurkendum skipanum,
- at umhvørvisliga besta tøka tøknin (BAT[1]) í størst møguligan mun verður nýtt,
- at vandin fyri óhappum, sum kunnu hava dálking við sær skal minkast mest møguligt,

[1] **Best Available Techniques.** Hugtakið *besta tøka tøknin* er at skilja sum mest framkomnu framleiðsluhættir, tilgongdir og rakstrarmannagongdir, sum til einhvørja tíð eru mest munadyggar fyri at fyribyrgja og avmarka dálking frá ávísari vinnugrein ella ávísum virksemi. Hugtakið fevnir ikki bert um tøkniligar loysnir, men eisini um t.d. nútímans framleiðsluhættir, nýtslu av minni dálkandi rávørum, avmarking av burturkasti, endurnýtslu og endurvinning, umframt nýtslu av rávørum og orku. Ein treyt fyri at koma undir hugtakið er eisini, at tøknin er roynd og tøk á marknaðinum fyri rímiligan kostnað.

Uppskot til umhvørvisgóðkenning varð sent Holva Fish og Vágs kommunu til viðmerkingar.
Vágs kommuna viðmerkti, at ongin treyt var til hvussu eitt møguligt óhapp t.d. um lýsi ella slógv fer á sjógv, verður bast.
Umhvørvisstovan hevur tikið hetta til eftirtektar og sett treyt inn í part 6.10, sum sigur hvat virkið skal gera, um nakað óhapp hendir.
Harafturat viðmerkti Vágs kommuna, at onki varð nevnt um møguligar luktampar frá virkseminum. Hetta er sett inn í part. 5.2.

P/F Holva Fish hevði ongar viðmekringar.

## 4. Lýsing av virkseminum

Virkið er staðsett á matr. nr. 168 f á Bryggjuni 13 í Vági. Sambært byggisamtyktini fyri Vág, er talan um øki D, sum er lagt út sum havna- og ídnaðarøki, sum umfatar bryggjupláss til rutusamband, bátapláss og øki til fiskavirkir. Umhvørvisstovan metir, at ætlaða virksemi er í tráð við byggisamtyktina.

Virkið fer at móttaka slógv, bæði pelagiskt og botnfiskaslógv, frá fiskvirkjum í Suðuroy og Sandoy.

Rávøran verður arbeitt so hvørt, sum hon kemur inn á virkið, tvs. sama dag.

Rávøran kemur inn á virkið og verður fryst í blokk. Slógvið verður síðan útflutt til framleiðslu av minkafóðri.

**Framleiðslan:**

Tað pelagiska slógvið kemur beinleiðis á virkið við tangabili og verður beinanvegin pumpað inn á virkið, fryst í blokk og sett inn á frystigoymsluna.

Slógvið frá botnfiskasløgum kemur í kørum. Slógvið er ísað, fyri at tryggja at tað er so ferskt sum gjørligt. Tað kemur inn á virkið, verður malið, fryst í blokk og sett inn á frystigoymsluna.

## 5. Lýsing av umhvørvisviðurskiftum

### 5.1. Rávøra

Rávøran, ið verður nýtt til virksemið er pelagiskt og botnfiskaslógv.

Antioxidantur verður nýttur til slógv, sum hevur høgt fitiinnihald.

Treyt verður sett til, at virkið í mest møguligan mun, skal brúka tey mest umhvørvisvinarligu reingerðar- og sóttreinsingarevni.

### 5.2. Luftútlát og óljóð

Virksemið á virkinum kann geva nakað av lukti og óljóði. Treytir verða tí settar til, at virksemi ikki skal føra til ampar av lukti og mest loyvda óljóð frá virkseminum.

### 5.3. Spillivatn

Tá virkið verður vaskað, kann roknast við at fiskarestir kunnu verða spulaðar av maskinum o.ø.. Tí verður treyt sett til, at virkið skal reinsa spillivatnið, t.d. við filtri, sum kann fyribyrgja at fiskarestir fara út við spillivatninum.

Treyt verður sett til at spillivatn verður leitt út á sjógv, har rákið førir spillivatnið úr landi, og har vatnskiftið áhaldandi er so stórt, at útleiðingar hvørki elva til uppsavnan av evnum og tilfari, til slóðir í sjónum ella til aðrar broytingar í umhvørvinum.

Um sjónlig tekin eru um dálking, t.d. um feitt ella annað sæst á sjónum, ella nógvur fuglur savnast við útleiðingina frá virkinum, er tað ábending um, at ov nógv lívrunnið tilfar er í spillivatninum. Um so er, skal virkið gera neyðugar ábøtur at fyribyrgja hesum. Treyt verður sett til hetta í góðkenningar-treytunum.

### 5.4. Burturkast

Nakað av burturkasti verður frá virkseminum, t.d. frá reinsingini av spillivatninum, vanligt burturkast at brenna og pappír til endurnýtslu og okkurt smávegis oljuskift ísamband við vanligt viðlíkahald.

Alt burturkast skal skiljast og goymast í hóskandi íløtum, áðrenn tað verður latið góðkendum móttakara.

Vandamikið burturkast, sosum spillolja frá maskinum, verður latið góðkendum móttakara.

## 6. Góðkenningartreytir

Umhvørvisgóðkenningin er givin við niðanfyri nevndu treytum:

### 6.1. Almennar treytir

6.1.1. Henda umhvørvisgóðkenning, við møguligum broytingum og dagføringum, skal altíð finnast á virkinum, og skulu øll viðkomandi starvsfólk kenna innihaldið og verða kunnað um ta lóggávu, sum góðkenningin er grundað á.

6.1.2. Allar sýnistøkur og kanningar v.m. sum verða kravdar í umhvørvisgóðkenningini skulu gerast av starvsstovu, sum kann góðkennast av Umhvørvisstovuni.

6.1.3. Allar sýnistøkur, kanningar og metingar av úrslitum verða goldnar av P/F Holva Fish.

6.1.4. Virkið má ikki víðkast ella broytast byggifrøðiliga ella rakstrarliga á ein hátt, ið kann økja um dálkingina frá virkinum, fyrr enn nýggj góðkenning er givin til hesa víðkan ella broyting.

6.1.5. Eigaraskifti, navnabroyting ella avtøka skal fráboðast Umhvørvisstovuni. Um virksemið steðgar, skal alt leyst tilfar og útgerð uttandura beinast burtur.

6.1.6. Í 5 ár eftir at góðkenningin er givin kunnu ikki gevast onnur boð ella forboð enn ásett í hesi góðkenning, uttan so at:

- nýggjar upplýsingar eru komnar fram um dálkingarskaðaárin.
- dálkingin elvir til umhvørvislig skaðaárin, ið ikki kundu síggjast frammanundan, tá ið góðkenningin varð givin.
- dálkingin í aðrar mátar verður størri enn hon, ið góðkenningin er givin eftir.

6.1.7. Tá ið meira enn 5 ár eru gingin eftir at góðkenningin er lýst, kann Umhvørvisstovan broyta treytirnar í góðkenningini, tá ið tað er umhvørvisliga grundað, ella um betri reinsingarhættir ella minni dálkandi framleiðsluhættir eru komnir fram.

### 6.2. Innrætting og rakstur

6.2.1. Eftir at virkið er liðugt umbygt, skal alt burturkast frá arbeiðinum burturbeinast, og økið rundan um virkið skal haldast reint og ruddiligt.

6.2.2. Virkið skal rekast og viðlíkahaldast soleiðis at treytirnar í hesi góðkenning altíð verða hildnar.

6.2.3. Best tøka tøknin (BAT) skal í størst møguligan mun verða nýtt.

## 6.3. Goymslur

6.3.1. Goymslan skal hava tætt undirlag soleiðis at møguligir lekar ella spill skulu kunna haldast aftur.

6.3.2. Flótandi og føst evni skulu goymast í íløtum, sum eru egnað til endamálið, og sum eru merkt, soleiðis at tað sæst, hvat er í.

## 6.4. Burturkast

6.4.1. Alt burturkast skal handfarast í samsvari við galdandi reglur um burturkast[2], og skal latast til góðkendan móttakara.

6.4.2. Burturkast skal goymast í íløtum ella bingjum, sum eru egnað til endamálið, og skal standa soleiðis, at tað ikki elvir til dálking ella er til ampa.

6.4.3. Burturkast skal regluliga latast góðkendum móttakara, soleiðis at goymslurnar ikki gerast ov stórar.

## 6.5. Spillivatn

6.5.1. Spillivatn frá virkinum skal leiðast ígjøgnum hóskandi reinsiskipan t.d. filtur, sum tryggjar at sum minst av lívrunnum evni verður leitt út.

6.5.2. Áðrenn gólvið verður spulað, skulu møguligar fiskarestir takast upp.

6.5.3. Reinsiskipanin skal røkjast og tømast eftir tørvi, soleiðis at hon altíð virkar til fulnar.

6.5.4. Spillivatn frá virkinum skal leiðast út á sjógv, har rákið førir spillivatnið úr landi, og har vatnskiftið áhaldandi er so stórt, at útleiðingar hvørki elva til uppsavnan av evnum og tilfari, til slóðir í sjónum ella til aðrar broytingar í umhvørvinum.

6.5.5. Munnin á spillivatnsútleiðingini skal í minsta lagi verða 1 metur undir størstu fjøru.

6.5.6. Tað skal vera møguligt at taka sýni av spillivatninum.

6.5.7. Møguligt spillvatn frá verkstaði ella maskinrúmi, skal ikki innhalda meiri enn 10 mg/l av mineralskari olju.

6.5.8. Nýtsla av reingerðarevnum og sóttreinsingarevnum skal avmarkast mest møguligt.

6.5.9. Um tekin eru um dálking, sum t.d. lýsi ella annað tilfar á sjónum, ella at nógvur fuglur savnast við útleiðingina, kann Umhvørvisstovan krevja, at virkið við ávísari freist ger eina ætlan og tíðarætlan fyri bøtandi tiltøkum.
Ætlanin skal góðkennast av Umhvørvisstovuni.

---

[2] Kunngerð nr. 147 frá 19. okt. 1995 um burturkast, broytt við kunngerð nr. 90 frá 28. sept. 2007

## 6.6. Óljóð, ristingar og ljós

6.6.1. Raksturin av virkseminum má ikki hava við sær, at óljóðsstøðið, fer upp um niðanfyri nevndu mørk máld við næsta grannamark í viðkomandi økjum sambært kommunalu byggisamtyktini.

**Talva 2: Markvirði fyri óljóð - dB(A)**

| | mán – frí kl. 07 – 18<br>leyg kl. 07 – 14 | mán – frí kl. 18 – 22<br>leygardag kl. 14 – 22<br>sunnu- og halgidagar kl. 07 – 22 | Allar dagar<br>kl. 22 – 07 |
|---|---|---|---|
| **Økið 1: Vinnuøki, har larmandi virksemi kann fara fram** | 70 dB | 70 dB | 70 dB |
| **Økið 2: Vinnuøki, har minni larmandi virksemi kann fara fram** | 60 dB | 60 dB | 60 dB |
| **Økið 3: Blandað bústaðar- og miðstaðarøki** | 55 dB | 45 dB | 40 dB |
| **Øki 4: Bústaðarøki** | 45 dB | 40 dB | 35 dB |

6.6.2. Í tíðarskeiðinum kl. 22-07 kann óljóð (løtuvirði) í bústaðarøkjum (øki 3 og 4) í mesta lagi fara 15 dB(A) upp um omanfyrinevndu markvirði. Nærmastu bústaðirnir liggja í einum øki, sum má metast at vera økið 3: Blandað bústaðar- og miðstaðarøki.

6.6.3. Alt virksemið skal fara fram soleiðis, at tað í minst møguligan mun hevur við sær ampar av óljóði, ristingum ella ljósi.

6.6.4. Um ampar verða av óljóði, ristingum ella ljósi, skal virkið seta bøtandi tiltøk í verk.

## 6.7. Útleiðing til luft

6.7.1. Virksemið má ikki hava við sær ampar av lukti, dusti ella royki uttanfyri øki virkisins.

6.7.2. Um ampar vera av lukti, dusti ella øðrum, skulu neyðug tiltøk setast í verk til eitt støði, ið Umhvørvisstovan kann góðtaka.

6.7.3. Allar útleiðingar til luft skulu førast uppeftir.

## 6.8. Rakstarskráseting/umhvørvisfrágreiðing

6.8.1. Virkið skal skráseta hesar upplýsingar:

- Nýtsla av rávørum, t.e. nøgd av móttiknum slógvi
- Nøgd av framleiddari vøru, býtt á sløg
- Avhendaðar nøgdir av burturkasti til góðkendan móttakara og hvønn tað er lati til
- Nøgdir og slag av vaskievnum, sóttreinsingarevnum o.ø.
- Rakstrartrupulleikar/óhapp
- Onnur viðurskifti av umhvørvisligum týdningi

6.8.2. Rakstrarskrásetingarnar skulu til eina og hvørja tíð kunna síggjast av eftirlitsmyndugleikanum og skulu goymast í 5 ár.

6.8.3. P/F Holva Fish skal á hvørjum ári gera umhvørvisfrágreiðing við uppgerð av rakstrarskrásetingum, frágreiðing um umhvørvisviðurskifti, óhapp, gjørd og ætlað umhvørvistiltøk, umbyggingar og broytingar, sum hava týdning fyri umhvørvið og útlát.

6.8.4. Frágreiðingin skal sendast Umhvørvisstovuni í seinasta lagi 1. mars í avloysandi árinum.

### 6.9. Innaneftirlit og umhvørvisstýrisskipan

6.9.1. Umhvørvisstovan kann krevja, at virkið skjalprógvar, at treytir í hesu góðkenning verða hildnar.

6.9.2. Umhvørvisstovan kann krevja, at virkið ger kanningar fyri at meta um møgulig dálkingarárin frá virkinum.

### 6.10. Óhapp

6.10.1. Virkið skal hava mannagongd fyri fyribyrging av óhappum og hvat skal gerast, um óhapp hendir, t.d. um lýsi ella slógv fer á sjógv.

6.10.2. Henda óhapp, skulu beinanvegin setast í verk tiltøk til avmarking og upprudding. Størri útlát ella dálking, skal skjótast gjørligt fráboðast Umhvørvisstovuni. Eisini skal ein frágreiðing um orsøk og møgulig tiltøk til upprudding v.m. sendast Umhvørvisstovuni[3].

## 7. Kæruvegleiðing

Henda avgerð kann, sambært § 66 í løgtingslóg nr. 134 frá 29. oktober 1988, um umhvørvisvernd, sum broytt við løgtingslóg nr. 128 frá 22. desember 2008, kærast til landsstýrismannin við umhvørvismálum. Kæran skal sendast Umhvørvisstovuni, sum síðan sendir hana til landsstýrismannin við neyðugum skjølum.

Kærufreistin er 4 vikur frá tí degi, umhvørvisgóðkenningin er almannakunngjørd. Um kærufreistin er úti ein leygardag ella ein halgidag, verður kærufreistin longd til tann fyrstkomandi gerandisdagin.

Suni Petersen, deildarleiðari

Lena Ziskason, umhvørvisviðgeri

**Avrit:** Vágs Kommuna, Vágsvegur 30, FO-900 Vágur
Landslæknin, Sigmundargøta 5, Postrúm 9, FO-110 Tórshavn.

[3] Dálkingaróhapp skulu eisini fráboðast til Løgregluna (dálking á landi) ella til Sjóbjargingarstøðina, MRCC-Tórshavn (dálking á sjónum).